## Skipalistin styttist

Íslendski skipalistin tódnaði eitt sindur í fjør. Morgunblaðið skrivar, at 38 skip vórðu ný- ella endurskrásett í fjør, men tá 69 skip samstundis fóru úr skrásetingini, vóru 31 færri skip á listanum nú við árslok. Av teimum 69 skipunum, sum fóru úr skrásetingini, vórðu 31 seld av landinum. Tann 1. januar stóðu 1.056 dekdfør í íslendsku skrásetingini, og tey vóru tilsamans 209.085 bruttotons. Teir opnu bátarnir, sum vóru 1.181 í tali, vóru 7.115 bruttotons. Samanumtikið var tað samlaða bruttotonsatalið góð 7.000 tons minni nú á nýggjárinum enn fyri einum ári síðani.



## Umval í Ukraina

Sum væntað fekk fyrrverandi forsætisráðharrin Viktor Janukovitj flestar atkvøður á forsetavalinum í Ukraina í gjár, men hann fekk ikki nóg nógvar, og tí verður eitt valumfar afturat tann 7. februar. Tá stendur valið millum Janukovitj og núverandi forsætisráðharran, Julia Timosjenko, sum fekk næstflestar atkvøður í gjár. Tað endaliga úrslitið av valinum í gjár var ikki greitt fyrrapartin, men fyribilstølini tá søgdu, at Janukovotj fekk umleið 35 prosent av atkvøðunum og Timosjenko umleið 26 prosent.

# Halda marknastøðina vera ov dýra

**Fólk, sum keypa ross úr Íslandi, halda gjaldið fyri at koma gjøgnum marknastøðina í Havn vera í so høgt. Tað kann ikki vera øðrvísi, ti kostnaðurin fyri húsið skal niðurgjaldast, sigur havnanevndarformaðurin**

DJÓRA-INNFLUTNINGUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað er kostnaðarmikið at innflyta ross, og tí hevði tað verið ein stór hjálp, um gjaldið fyri at koma gjøgnum marknastøðina á Eystaru bryggju í Havn.

Hetta sigur Leif Berg, sum hevur Berg Hestar og javnan keypir ross úr Íslandi.

Áðrenn marknastaðin varð bygd, noyddust rossini at koma umvegis Danmark til Føroya, og av tí at rossafólkini hildu hetta vera ein ov langan túr fyri rossini, fóru rossafólk at streingja á at fáa bygd eina marknastøð í Tórshavnar havn.

Hetta var neyðugt, tí rossini skulu hava váttan frá djóralækna, áðrenn tey kunnu sleppa inn í landið. Frammanundan fingu tey hesa váttan á marknastøð í Danmark ella í Svøríki og kundi so flytast víðari til Føroya.

Støðin er ikki annað enn eitt lítið hús, sum stendur á bryggjuni, men tað kostaði kortini hálva millión krónur at fáa upp.

### Dýrari í Føroyum

Gjaldið fyri at koma við einum rossi gjøgnum støðina, mvg og djóralæknaváttan er meira enn 6.000 krónur, og tað heldur Leif Berg vera ov nógv. Sama tænasta í Danmark kostar væl minni, sigur Leif Berg.

Keypsprísurin fyri rossið í Íslandi liggur millum 12.000 og 15.000 krónur umframt mvg. Keyparin má eisini gjalda fyri at flyta rossið til Seyðisfjarðar, og Smyril Line tekur 3.000 krónur fyri at flyta rossið til Føroya. Keyparin má sjálvur til Íslands eftir rossinum og má keypa sær ferðaseðil.

Tá ið rossið er komið inn í Føroyar, hevur tað kostað keyparanum millum 25.000 og 30.000 krónur.

- Tað hevði munað væl, um marknagjaldið ikki var so høgt, sigur Leif Berg.

### Ov fá ross

Grundgevingin fyri høga gjaldinum er, at húsið skal avskrivast sum aðrar íløgur, sigur Jákup Símun Simonsen, formaður í havnadeild Tórshavnar býráðs.

Haraftrat koma útreiðslur til reinhald. Tað má gerast væl reint, hvørja ferð eitt ross hevur verið inni í húsinum.

- Tað kann ikki gerast bíligari, tí tað koma lutfalsliga fá ross til Føroya um árið. Høvdu fleiri ross komið, kundu vit tosa um at lækkað kostnaðin, sigur Jákup Simonsen.

Í fjør komu 28 ross úr Íslandi til Føroya.

### Vinnumøguleikar

Leif Berg heldur, at tað má bera til at finna eina skipan, soleiðis at alt ikki gongur út uppá at gjalda íløguna aftur. Hann heldur, at tað átti at vra ein landsuppgáva at rikið eina marknastøð.

Haraftrat sær hann fleiri vinnumøguleikar í at innflyta ross.

- Vit kundu keypt tey úr Íslandi, vant tey her, og so selt tey av landinum aftur sum vand ross, sigur Leif Berg.

Hann leggur aftrat, at íslendingar kundu hugsað sær at útflutt ross gjøgnum Føroyar, men tað er eingin livandi møguleiki, tá ið marknagjaldið er so nógv hægri her enn í øðrum londum.

Leif Berg upplýsir, at hóast tað er betri fyri ross at flyta rossini til Føroya beinleiðis úr Íslandi, tí ferðin tekur bara 18 tímar. Verri er at skula flúgva ella sigla rissið til Danmarkar og víðari haðani til Føroya. Men summi gera tað framvegis, sigur hann.




*Marknastøðin er bara hetta litla húsið á brygguni í Havn. Hesa árstíðina koma eingi ross, tí íslendingar lata ikki ross fara av landi við skipi um veturin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Ein konubukaranátt

**Næstan samstundis fekk politiið boð um tveir tilburðir, har menninir høvdu bukað konur sínar**

HARÐSKAPUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað gongur stundum hart fyri seg millum mann og konu, og leygarnáttina vendu tvær kvinnur sær til politiið og meldaðu menn sínar fyri harðskap.

Annar tilburðurin var í Havn. Maðurin, sum var í 40-árunum, hevði sligið konu sína i andlitið við knýttum neva, og hon fekk eina tveir cm langa rivu oman fyri aðra eygnabrúnna.

Kvinnan, sum var gjøgnumbankað, varð løgd inn á Landssjúkrahúsið til kanningar.

Hetta hendi leygarnáttina, tá klokkan var farin av eitt.

Trý korter seinni ringdi ein kvinna í Sørvági til politiið og boðaði frá, at maður hennara hevði sligið skrætt klæði hennara og sligið hana í gólvið.

Henda kvinnan var ikki so illa viðfarin sum hin fyrra.

## Fóturin kom undir hjólið

**Politiið vil fegin tosa við bilføraran á bilinum, sum tíðliga sunnumorgunin koyrdi á fótin á einum ungum manni og rýmdi**

FERÐSLUÓHAPP

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Klokkan var farin av hálvgum seks sunnumorgunin, tá ið tveir menn í 20-árunum vóru á veg í eitt morgunball á Argjum.

Teir høvdu ilt við at finna húsið, teir skuldu vitja, men tá ið teir vóru staddir í Reynsgøtu, kom ein bilur.

Teir báðir ætlaðu at steðga bilinum fyri at spyrja bilføraran um veg, og teir fóru yvir móti bilinum.

Men bilurin steðgaði ikki, og annar av teimum ungu monnunum var so óheppin, at fóturin kom undir hjólið, og fóturin brotnaði.

Bilurin fór bara víðari.

Teir báðir ungu menninir hava ikki dgað at sagt politinum nakað um bilin. Politiið veit tí hvørki, um bilurin var stórur ella litil, hvussu vorðin hann var, um tað var ein vanligur bilur ella ein hýrivognur.

Politiið heitir inniliga á bilføraran um at gera vart við seg fyri at hoyra hansara frágreiðing um tilburðin.

## Ótangarnir settir í arbeiði

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Um fimm tíðina leygarmorgunin fekk politiið í Havn boð um, at unglingar vóru í ferð við at bera beinkir úr garðinum við Brúna skúla í Havn.

Politistar komu og fingu hendur á unglingunum, og teir sluppu at bera allar beinkurnar inn aftur í garðin.

Teir fáa eisini bót fyri brot á politiviðtøkurnar.